tíðindablaðið sosialurin
Argjavegur 26
Postsmoga 76,
3800 Tórshavn
telefon 11820
Útgevari: p/f sosialurin
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Fyritaksstjóri: Krisjan Dahl
Blaðfólk: Høgni Djurhuus, Dagny Joensen og Jóhann Mortensen
Uppseting: p/f sosialurin. Prent: p/f pressan 1981

Munurin er lítil — helst ongin

oddagrein

Í ODDAGREIN hósdagin skrivar Dimmalætting um friðargonguna í Mjørkadali og samanber hesa við sonevnda pálmasunnudagsslagið í 1959 tá fyrrverandi formaður Føroya Javnaðarfloks, P. M. Dam, sáli varð móttikin av mótmælisfólki úti á bryggjuni í Havn.

DIMMALÆTTING gloymir kortini at siga alla søguna. Søgan er nevniliga tann, at alt Mjørkadalsmálið var avgjørt áðrenn P. M. Dam og javnaðarflokkurin komu í landsstýrið, men onki kom alment fram, fyrr enn landsstýrisskifti hevði verið. Tað var samgongan, ið sat frammanundan, sum gav øll loyvi í sambandi við støðina í Mjørkadali, meðan P. M. Dam, sáli stóð fyri skotum, av tí at hann var løgmaður, tá loyniverkið hjá sambandsflokkinum, fólkaflokkinum og sjálvstýrisflokkinum kom fram í ljósið.

MEN TAÐ, SUM Dimmalætting vil við samanberingini millum friðargonguna í Mjørkadali og pálmasunnudagsslagið á sinni, er at vísa á, at ungmannafelag javnaðarfloksins var við í friðargonguni og hetta tekur blaðið sum prógv um, at javnaðarflokkurin ikki er tann sami undir leiðslu Atla Dam's. Dimmalætting heldur, at hesar báðar hendingarnar avdúka, at munur er á javnaðarflokkinum tá og nú. Men hetta er sjálvandi tómt møsn úr enda í annan.

JAVNAÐARFLOKKURIN hevur eina virkisskrá og eini grundsjónarmið. Virkisskránna endurskoðar flokkurin fjórðahvørt ár, meðan grundsjónarmið javnaðarfloksins hava staðið óbroytt øll árini, og tann sum lesur hesi, varnast beinan vegin, at tað er sjálvur P. M. Dam, sáli, sum hevur orðað hesi grundsjónarmið floksins. Og har stendur: »Føroyar skulu, so lítið vit enn evna, gera sítt besta til frama fyri friði og semju millum allar tjóðir og á besta hátt og eftir førimuni stríðast ímóti militarismu.«.

TÁ UNGMANNAFELAG javnaðarfloksins er við í friðargongum og á friðarfundum ella øðrum tiltøkum av tí slagnum, so er tað fyri at stuðla tey orðini, sum sjálvur P. M. Dam, sáli feldi niður í grundsjónarmið javnaðarfloksins, um at virka fyri friði og semju og at virka ímóti militarismu. At virka ímóti hermegi og hernaðardubbiing uttan mun til hvør tað er sum vil nýta hermegi ella fremja hernaðardubbing.

DIMMALÆTTING minnir á, at hin minniliga pálmasunnudagin í 1959, var ætlanin at sláa løgmann við einum gassa. Og síðani heldur blaðið fyri, at so royndust friðarfólk tá. Hvør skal siga, at friðarfólk eru nakrir ófriðarkroppar. Vit skulu á ongan hátt bera í bøtuflaka fyri gassanum, men munurin er ikki serliga stórur, tá talan er um at gera ófrið við einum gassa, og so tað at órógva gravarfriðin.

HETTA SEINNA ger Dimmalætting seg seka í. Blaðið pentar saman ósannindir um deyðan mann, fyri so at nýta hesi ósannindi ímóti tí flokki, sum hesin maður vígdi alt sítt lív til. Munurin ímillum gassan pálmasunnudag í 1959 og oddagreinina í Dimmalætting 19. juli 1984 er lítil. Helst ongin.

Væl heimafturkomin harra løgmaður

Sannleikin skal fram um løgmaður vil tað ella ikki

Ikki er løgmaðu í »feriuhumør«, ikk er hann bliður í Dimmalætting 14/7 1984.

Kanska eru tað nervarnir, nú heystardagur nærkast.

Men væl skilji eg hann. Óhugaligt er at verða ryktur frá søguligu leivdunum í Rom til kalda veruleikan her heima; tí sum partamaður løgmans á sinni segði í Dimmalætting, »Sannleikin skal fram«, so segði Ivan.

Góðan morgun Sverre Midjord, kallar løgmaður grein sína, sum skal vera ein verjan fyri hann og førda politikkin hjá samgonguni, fyri tey tiltøk og tær avgerðir, sum eg havi víst á eru framdar uppá mangan løgnan hátt.

Løgmaður leggur meg undir at skuldseta hann fyri bæði likt og ólikt. Harra løgmaður, tað skuldi verið so langt frá mær at gjørt slíkt, tað eg havi gjørt og framvegis fari at gera, er, at lesa bløðini, at lurta eftir útvarpi og soleiðis vísa á, hvat egnu samgongumenn løgmans siga og vísa á.

Hilmar Kass, Asbjørn Joensen og ikki at gloyma Torbjørn Poulsen hava í skriving og talu sagt Føroya fólki frá, at tað verður førdur ein vinar- og kenningarpolitikkur, at tað ræður um at hava tað rætta grannskoðaravirki fyri at vinna sømdir hjá verandi samgongu og landastýri. Eg havi ongantíð ivast í, at hesir menn siga sannleikan, og so leingi sum hetta ikki er afturvíst, tað sum eg havi citerað, so leingi er tað sannleikin, og sum Ivan Johannesen so ramandi segði, »Sannleikin skal fram«.

Uppá spurning um hvørji arbeiðsplás henda samgonga hevur skapt, vísir løgmaður til skipasmiðjuna í Vági.

Um so var, at samgongan hevði loyst hetta mál, so skuldi eg verið fyrstur at takkað teimum fyri tað, men tað er bara ikki so.

Her, sum tíanverri so mangan, fer løgmaður lætt um sannleikan. Tað var ikki samgongan, sum loysti hetta mál, men javnaðarflokkurin, sum altíð tá tað viðvíkir vinnulívinum og arbeiðsskapandi tiltøkum eisini hesaferð gjørdi sín politikk galdandi. Hetta er jú okkara politikkur. Vit skoraðu á fyri at vinna hesum tiltaki sømdir. Við okkara atkvøðum á løgtingi bleiv nýggju arbeiðsplássini við skipasmiðjuna í Vági skapað.

Løgmaður, sum sjálvur umsitur ídnaðarmál, var ikki førur fyri at fáa egnu samgongu sína at taka undir við hesum átrokandi máli. Løgmaður fekk ikki grønt ljós frá egnu samgongumonnum sínum til at fremja skipasmiðjuna í Vági.

Men málið bleiv tíbetur loyst á løgtingi við hjálp frá javnaðarflokkinum og hinari andstøðuni á tingi.

Og fyri líka at nevna eitt annað mál av sama slagi, skipasmiðjuna í Vestmanna, har sambandsmenn eisini vóru ímóti. Men eisini har var tað javnaðarflokkurin, sum saman við andstøðuni bjargaði hesum stóra arbeiðsplássi, og hetta vita bæði vestmenningar og vágbingar.

Viðvíkjandi koyring til Hvalbiar, fyri har aftaná at hava gniggjað eyguni, skal eg siggja teirra flakavirki.

Ikki nýtist mær at gniggja eyguni harra løgmaður, men vaknið heldur úr svøvni tykkara og loysið teir trupulleikar, sum nevnda virki, sambært skriving í bløðunum er komið í.

Men kanska hevur skriving mín órógvað so mikið, at løgmaður og samgongan eru vaknaðir og so fara til verka.

Men løgmaður er lættur á sær, loypur langt, úr Hvalba til Vágs og tillutar sær tað, hann einki eigur í.

Ikki kendist hann við egnu partamenn sínar á Tvøroyri, tá teir við sjálvum formanninum á odda bóðu um eina samtalu um ymisk vinnulívsmál her, teimum varð víst durabakið.

Teir fingu ikki so frægt sum góðan morgun, har eri eg munin betri.

Viðvíkjandi teimum tómu grunnunum, sum tit hava fylt, er bert at siga — við eykatolli og skatti, og við framvegis at ognarskriva partabrøv av virkjum, sum eru seld og avhandað, sum tað framgongur av roknaskaparyvirlitinum 1983. Tá ber væl til at vísa yvirskot. Men hetta veit løgmaður alt um.

Eg veri nøgdur við ta avgerð, sum nú suðuroyingar einaferð fara at geva mær, men sannast má, at við einari samgongu av slíkum »formati« sum hesari, krevjast sterkar kreftir at standa ímóti við.

Og hetta sannar sjálvt løgmaður.

Sverre Midjord

Sig heldur sum er

Samgongan við sambandinum á odda fremur kostnaðarmiklar yvirtøkur. Havnastudningin lorkaði hon burtur og studningin til bygging av tekniskum skúlum hava teir fingið lækkað við umleið 80 prosentum

Í eini longri politiskari frágreiðing fortelur Pauli Ellefsen okkum hvussu óførur hann er sum garantur fyri statsstudning.

P.E. koyri somu slitnu plátuna um blokkstudningsskipan og javnaðarmenn, sum bara vilja yvirtaka.

Men Pauli Ellefsen, tað er nú meðan løgmaður eitur Pauli Ellefsen, at vit hava fingið teir fyrstu blokkarnar.

Tað vóru annars javnaðarmenn, sum bremsaðu teirri hóttandi blokkstudningsberferðini, sum myndugleikarnir í Keypmannahavn vóru so hugaðir fyri, ikki minst frá embætismanna síðu. Og tað eydnaðist at bremsa, men tá var Atli Dam løgmaður.

Hví ikki siga sum er. At vit høvdu rent okkum fastar í danska blokkstudningskravið, um javnaðarmenn ikki høvdu talað harðliga at, og høvdu statsministaran at góðtaka, at vit gjørdu tað nevndarálitið, sum í dag liggur sum eitt gott samráðingargrundarlag fyri framtíðar studningsveitan til Føroay.

Hesum arbeiði hevur P.E. av taktiskum politiskum grundum steðgað. Ístaðinfyri hevur hann framprovokerað ta støðu, vit kenna í dag. At ríkisstýrið á einum øki nú og øðrum tá, **smoygir niðuryvir** okkum **blokkstudningini** ella kanska heldur sagt, blakar okkum blokkarnar í høvdið. Viðhvørt 0 blokkar.

Eitt dømi er havnastudningurin, sum P.E. hevur svølgt, tað bleiv eitt 0.

Annað dømi er tað, sumEilif Samuelsen mátti svølgja. Vit fáa 15 milj. kr. av 70 milj. kr., sum tað kostar at byggja tekniskú skúlarnar. Her er so eitt dømi um yvirtøku uttan samráðing, sum fyrr var figgjað 100 % úr statskassanum.

Hetta er hvørki meira ella minni enn blokkstudningur, sum er smoygdur niðuryvir okkum, tí at sambandsflokkurin av taktiskum politiskum grundum ikki hevur viljað samráðst um framtíðar studningsskipan til Føroya úr ríkiskassanum.

Soleiðis er tað bara.

J. Lindenskov